Økið við gamla spinnaríið fríðkast

FRÍÐKAN
Turið Kjølbro

Tað eru ikki nógv serlig pláss, tú hevur hug at steðga á, tá ið tú kemur út á Argir. Men í framtíðini verður bøtt um hetta, tí økið við gamla spinnaríið á Argjum verður nú fríðkað. Moldgarður verður gjørdur fyri at verja tey, sum eru inni á økinum ímóti ferðslu og bilóljóði. Skráin verður grasaður á síðuni, ið vendir út ímóti vegnum, og runnar verða plantaðir á síðuni, ið vendir ímóti spinnarínum. Gongugøta framvið Sandá er í umbúna og gongubrúgv tvørtur um ánna verður helst eisini gjørd.

- Tankin at fríðka økið er ikki heilt nýggjur. Fyrrverandi borgarstjórin í Havn helt, at staðið, har jólatræið stendur á Argjum, er keðiligt og jánkasligt. Í fjør stóð tað á einum parkerings plássi úti við kirkjuna. Tí ætla vit at gera eitt pláss niðri við ánna, har slættað verður við skervi, og har sleppur jólatræið at standa í framtíðini. Bonkur verður eisini settur á tað økið.

framtíðini kunnu argjafólk leita sær á økið við gamla spinnaríið, tá ið jólatræið verður tendrað

Mynd: Jens Kristian Vang

Veitirnar eru reinsaðar, áin er so at siga rein, og gøtur verða gjørdar ymsastaðni. Ætlanin er at gera gøtur allan vegin fram við Sandá, men tað er ein størri fyritøka, sigur Tóri í Hoyvík, býargartnari.

Býargartnarin roknar við, at arbeiðið at fríðka økið við gamla spinnaríið verður liðugt í vár.

- Vit kundu eisini hugsað okkum at fríðka økið omaneftir Sandá og undir brúnni, men enn eru hetta bara tankar.

Húsið hjá Sílaveiðufelagnum, sum liggur beint við síðuna av spinnarínum, verður eisini umvælt. Tey verða takt við nýggjari flagtekju, húsini fáa nýggja hurð og annað verður gjørt. Tórshavnar býráð fer síðani at gera eina brúksavtalu við Sílaveiðufelagið.

- Í sambandi við, at jólatræið verður tendrað, kann húsið brúkast til kaffisølu og annað. Barnagarðar, sum fara útferð í økinum, kunnu hava amboð liggjandi til børnini at brúka, sigur Tóri í Hoyvík.

J.nr.: 008/03.2002

Í trúnaði

Sansir søkja royndan grafikara

Tú hevur starvsroyndir og góðan formsans.

Tú ert ein meistari við Photo Shop, Illustrator og Quark.

Tú ert stinn/ur í føroyskum.

Tú hevur gott samband við fólk og kundar.

Ert tú tann, vit leita eftir, fært tú ábyrgd av tínum egna øki og eina góða løn.

Seinasta freist at søkja er 15. apríl.

Tú skalt byrja skjótast gjørligt.

SANSIR

Ring 355 355 og tosa við Høgna (aftaná arbeiðstid tel 220401) ella send ein teldupost: hogni@sansir.fo
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildarsamskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, sum tekur støði í samleikanum og mentanini hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi. Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini. Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo

VIÐMERKINGAR

Stuðul og mentan

Viðmerking til Jógvan á Lakjuni

Turið Kjølbro

Ikki so sjáldan kasta politikarar og onnur blaðfólk fyri at leggja annað í tað, tey hava sagt undir eini blaðsamroðu, siga seg vera skeivt siterað og misskilt. Sjáldan tímir ein at svara slíkum aftur, men hesa ferð skal afturmeldingin hjá Jógvani á Lakjuni í Dimmalætting týsdagin ikki standa ósvarað. Gjørdi viðtal við formannin í mentunarnevnd Føroya Løgtings dagin eftir aðalorðaskiftið um mentunarálitið, hægsta lóggevandi persónin í landinum, tá ið umræður mentan, fyri at útgreina nærri hansara sjónarmið til list og listafólk, sum hann í seinastuni ikki hevur dult fyri. Hansara sjónarmið eru rættiliga provokerandi, tey liggja langt frá teimum tankum, ið dagsins listafólk ganga við, og kunnu ikki sigast slóða fyri nøkrum fruktagóðum samskifti ella orðaskifti um list og kor hjá listafólki. Viðtalan prógvaði bara enn eina ferð tey sjónarmið, formaðurin hevur um listafólk. Gjørdi Jógvani tann beina, fyri tað fyrsta at pilka øll tey sitatini út, sum rætt og slætt ikki vóru borðbær og tey vóru ikki fá, umframt at eg segði honum, hvussu greinin varð skrivað og hvør yvirskriftin varð. "Tað mást tú um", var svarið og greinin fór í blaðið. At Jógvan síðani sigur seg ikki "heilt kenna yvirskriftina aftur", er beinleiðis ósatt. Leggi altið størstan dentin á at sitera fólk rætt. Yvirskriftin er orðarætt, samroðan er bandað, og Jógvan visti, hvat varð skrivað. Spurningurin er so, um Jógvan visti, hvat hann segði. Hetta er enn eitt dømi um, at politikarar serliga, ikki vita, hvat tey siga, tá ið tey tosa við tíðindafólk, enn minni vita og kenna avleiðingarnar av tí, tey siga.

ítróttur

Nr. 60 • mikudagur • 27. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Bólkur 1:

B36 greiddi sína skyldu

B36 og VB komu væl frá byrjan, tá tey vunnu sínar dystir móti ávikavist Sumba og NSÍ. Báðir dystirnir endaðu 2-1. B36 var tó als ikki sannførandi í 2-1 sigrinum á Krossinum, og VB fekk hjálp frá Jens Martini, tá vágbingar vunnu á NSÍ

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

VB og B36 komu best frá byrjan eftir fyrsta dystin í bólki 1. B36 vann 2-1 í Sumba og VB basti NSÍ á heimavølli við sama úrsliti.

NSÍ hevði eina torføror byrjan uppá bólkaspælið í steypakappingini í ár, tá liðið skuldi til Vágs. Og tað vísti seg, at vágbingar vóru ov stinnir.

Tað var annars NSÍ, ið kom best frá byrjan, tá Sonni L. Petersen legði útiliðið framum, tá tveir minuttir vóru leiktir. Sonni gjørdist leysur beint undir málinum, og hann hevði lætt við at seta bóltin í netið.

NSÍ var við yvirlutan fyri steðgin, men runavíkingar megnaðu ikki at økja um leiðsluna. Vantandi neyvleikin hjá NSÍ gav vágbingum møguleikan at venda dystinum, og heimaliðið var nógv vandamiklari frammanfyri málinum, tá teir einaferð spældu seg til nakrar veruligar málmøguleikar.

Tað var Tórur Holm, ið javnaði, tá fimtan minuttir vóru eftir. Eitt fríspark varð trillað stutt til Tór, sum langaði til, og málverjin hevði ongan møguleika.

Tað síðsta málið má Jens Martin Knudsen taka á sín kappa. Málverjin hjá VB sparkar bóltin langt niðan á hálvuna hjá NSÍ, har Jens Martin letur bóltin hoppa. Bólturin støkkur á tvørstongina og eftir trunkaspæl frammanfyri málinum skorar nýggi jugoslavin Nenad Zivanovic sigursmálið.

Hóast NSÍ hevði yvirvág meginpartin av dystinum, fór VB við øllum stigunum.

B36 vann tepurt

Stutt sunnanfyri var dystur millum Sumba og B36. Greipuvinnararnir úr Havn fóru við einum sera skerdum liði at møta Sumba. Jákup á Borg, John Petersen kunnu nevnast sum týdningarmiklastu leikararnir, ið ikki vóru við. Tilsamans vóru eini seks leikarar, ið ikki vóru tøkir.

Hóast B36 var stórfavorittur, var sigurin sera tepur, og dysturin kundi farið báðar vegir í seinna hálvleiki.

Jens Kristian Hansen legði B36 framum miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá setti høvdið á eitt hornaspark. 1-0 var eisini støðan við steðgin.

Í seinna hálvleiki megnaði Sumba at javna. B36 missir bóltin á miðvøllinum, Sumba fer í kontra. Aftasti maðurin hjá B36 Egil Zachariasen fellir áleyparan hjá Sumba, og hóast B36-ararnir vildu vera við, at tað var uttanfyri brotsteigin, dømir dómarin brotsspark.

Eirik Joensen skorar trygt og so stóð á jøvnum. Hesa løtuni í seinna hálvleiki stóð á gomlum nøglum hjá meistaraliðnum úr Havn.

Lítla løtu seinni var Sumba nær við at leggja seg á odda. Ein sumbingur roynir seg við skoti, sum ber við eitt B36-bein, og bólturin brestur á tvørstongina og útaftur í spælið.

B36 reið tó stormin av og megnaði at fáa sigursmálið. Útiliðið fekk fríspark í høgu síðu, sum Magni á Lakjuni sendi innfyri. Eftir trunkaspæl datt bólturin fyri føturnar Karl Leonsson, sum langaði til úr stuttari fjarstøðu. Ikki serliga sannførandi hjá B36 í fyrsta dystinum í hesum kappingarárinum, men trý stig hóast alt.

Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

Bólkur 1

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B36	1	1 - 0 - 0	2	1	1	3
2	VB	1	1 - 0 - 0	2	1	1	3
3	NSÍ	1	0 - 0 - 1	1	2	-1	0
4	Sumba	1	0 - 0 - 1	1	2	-1	0

Bólkur 2

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	TB	1	1 - 0 - 0	2	1	1	3
2	FSV	1	0 - 1 - 0	1	1	0	1
3	GÍ	1	0 - 1 - 0	1	1	0	1
4	EB/Str.	1	0 - 0 - 1	1	2	-1	0

Bólkur 3

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Skála	1	1 - 0 - 0	4	2	2	3
2	HB	1	1 - 0 - 0	3	1	2	3
3	KÍ	1	0 - 0 - 1	2	4	-2	0
4	B68	1	0 - 0 - 1	1	3	-2	0

Bólkur 2:

TB best frá byrjan

TB vann sín fyrsta dyst í steypakappingini, tá uppflytararnir vunnu 2-1 á EB/Streymi við máli í seinastu løtu. Heldur óventað megnaði FS Vágar at taka stig frá GÍ

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

TB vann sín fyrsta dyst í steypakappingini um Løgmassteypið á hesum sinni. Tvøroyrarmenn vunnu 2-1 á EB/Streymi, men spenningur var til síðstu løtu, tí TB fekk ikki sigursmálið fyrr enn í seinasta minutti.

TB legði seg framum stutt fyri steðgin, tá ungi leikarin Rasmus Nolsøe gjørdist leysur við málverjanum. Hann skoraði trygt og TB hevði eitt gott útgangsstøði til seinna hálvleiki.

EB/Streymur svaraði tó aftur, og tað var aftur ein blaðungur leikari, ið setti bóltin í netið. Hesuferð var tað Marni Djurhuus, sum javnaði fyri sundalagsmenn.

Stutt fyri leiklok var tað ein av útlendsku leikarunum hjá TB, ið avgjørdi dystin. Alexander Radosavlevic hevði seinasta fótin á bóltinum, tá bert ein minuttur var eftir at spæla. TB tryggjaði sær harvið trý stig í fyrsta dystinum í bólkaspælinum.

FS Vágar tók stig frá GÍ

Silvurvinnararnir frá í fjør, GÍ, var á vitjan í Vágunum, og gøtumenn vóru favorittar undan dystinum.

Tað var gamla landsliðshetjan Albert Ari Thomassen, sum legði heimaliðið framum eftir eitt korter, men tiggju minuttir fyri steðgin javnaði Bartal Eliassen fyri GÍ. Einki mál kom eftir steðgin, og dysturin endaði við javnleiki.

Gøtumenn komu sostatt ikki serliga væl frá byrjan í hesari steypakappingini, men liðið er framvegis stórfavorittur at vinna bólkin. Í Vágunum munnu tey hinvegin hava góðar vónir um at vinna 2. deild í ár.

Ari Thomassen skoraði málið hjá FS Vágum í dystinum móti GÍ um vikuskiftið. Dysturin endaði við javnleiki 1-1